Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi
(Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av punktgjøldum á brennievni og broyting av heiti)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 17 frá 15. mars 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg**
um
avgjald á framleiðslu og innflutning"

2. Í kapitli 27 í frumskjali 1 í skjali 1 verða punktavgjøldini á vørunumrunum 2710.12.41-2710.12.59 í 3. teigi broytt frá "2,40 kr. pr. ltr." til: "3,00 kr. pr. ltr."

3. Í kapitli 27 í frumskjali 1 í skjali 1 verða punktavgjøldini á vørunumrunum 2710.19.43 og 2710.19.46 í 3. teigi broytt frá "0,50 kr. pr. ltr." til: "1,10 kr. pr. ltr."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Samtykt á Løgtingi hin 15. desember 2023 við 18-0-15 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 18. desember 2023

stjóri

LM-040/2023